# Tað kann verða so skjótt

## Helvtin kundi livað

Í skrivinum frá landslæknanum sæst eisini, at av teimum 66 fólkunum, ið doyðu av ferðsluvanlukkum í tíðarskeiðnum 01.01. 1986 - 31.12.2003, vóru tað:

– 9, ið við vissu nýttu trygdarbelti ella hjálm.
– 44, ið við vissu ikki nýttu trygdarbelti ella hjálm.
– 13 deyðsvanlukkur vóru, har ikki varð upplýst hvørt offrini nýttu seðla ella hjálm.

Høgni Debes Joensen, landslækni, metur, at av teimum 44, ið við vissu ikki nýttu bilbelti, kundi umleið helvtin verið bjargað, um tey høvdu sitið í trygdarseðla. Hesi 12 árini, kundi beltið og hjálmurin við øðrum orðum havt bjargað uml. 22 fólkum, sum nærum øll vóru ungfólk, frá ferðsludeyðanum. Høvdu tey bara havt spent seg føst, høvdu tey allarhelst ikki doyð á føroysku vegunum.

Tað finnast bert tøl yvir tær ferðsluvanlukkur, har fólk eru deyð. Men umframt tey deyðu, mugu vit eisini hava í huga øll tey, ið hava fingið mein av ferðsluvanlukkum. Eingi nágreinilig hagtøl eru yvir ferðsluvanlukkur, har fólk "einans" verða skadd. Høgni Debes Joensen, landslækni hevur tó ein útrokningarhátt:

Fyri hvørt fólk sum doyr, eru eini 25, ið fáa skaða. Av hesum 25, sum fáa skaða, eru 10%, ið fáa álvarsamt mein.

Taka við omanfyrinevndu tøl, síggja vit sostatt, at fyri tey 66, ið eru deyð seinastu 17 árini, eru tað ikki færri enn 1650 fólk, ið eru komin til skaða í ferðsluni. Av teimum eru 165, sum eru álvarsliga skadd.

Hetta eru ræðandi tøl, og landslæknin vil tí staðfesta, hvussu týdningarmikið tað er at upplýsa og minna fólk á, altíð at nýta bilbeltið. Hann vil heita á bæði bilførarar og bilpassagerar, um at minnast til altíð at nýta trygdarseðlan. Bæði á styttri og longri túrum.

**eys**

**– Vit eru noydd at blíva við og blíva við at ávara um vandan í ferðsluni. Tað er so ótrúliga lætt at gloyma, hvussu skjótt tað í veruleikanum kann verða at koma út fyri eini vanlukku. Tað er bert at traðka eitt sindur á speedaran, og áðrenn tú veist av, hevur tú gjørt av við onkran, sigur Rúna Sivertsen, forkvinna í Ráðnum fyri Ferðslutrygd. – Tí er hesin dagurin ein góð áminning til okkum øll, um at vísa størri varsemi á vegunum, heldur hon**

MINNINGARDAGUR TEIRRA DEYÐU Í FERÐSLUNI
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*Sunnudagin 4. juli verða allarhelst fleiri blómutyssi at síggja á føroysku vegunum, har deyðsvanlukkur hava verið. – Hetta er ein góð áminning um vandan,heldur Rúna Sivertsen, forkvinna í Ráðnum fyri Ferðslutrygd*
*Savnsmynd*

Á Ráðnum fyri Ferðslutrygd eru tey ógvuliga glað um, at dagur teirra, sum eru farin í ferðsluni, verður tikin í so stórum álvara.

– Okkara mál er nullhugsjónin, og vit halda avgjørt, at hesin dagurin er ein góð áminning til fólk um, hvussu vandamikil ferðslan kann vera. Hann minnir fólk á, hvussu lítið í grundini skal til. Tað er bara at traðka á speedaran eina lítla løtu, og áðrenn tú veist av hevur tú gjørt av við onkran -ella teg sjálvan, sigur Rúna Sivertsen, forkvinna í Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

Hon sigur, at við nullhugsjónini ætla tey at fáa fólk at hugsa seg um, táið tey ferðast í ferðsluni.

– Tað fara altíð at verða ferðsluvanlukkur. Summar fært tú heilt einfalt einki gjørt við, tí eingin hevur skyldina, sum so. Tað, sum vit miðja eftir, er at forða teimum vanlukkum, sum henda av ósketni. Av ov nógvari ferð, rúsdrekka ella onkrum tílíkum. Hetta eru alt ting, ið kunnu og mugu broytast, heldur hon. – Tað snýr seg um hugburð. Hyggja vit eitt sindur aftur í tíðina, síggja vit, at deyðstølini í ferðsluni vóru nógv størri fyrr, enn tey eru nú. Eg trúgvi, at lógin um trygdarbelti hevur havt sína ávirkan. Men hugburðurin er eisini broyttur. T.d. táið tað kemur til rúsdrekka. Flestu fólk lata nú bilin standa, um tey smakka sær á. Eisini um tey bara fáa sær eitt glas av víni, sigur Rúna.

### Dagur teirra, ið eru farin í ferðsluni

Í ár er tað 5. ferð, at minningardagurin verður hildin. Tað er Ingi Gunnarson, ið sjálvboðin er primus motor í tiltakinum.

Einaferð koyrdi hann einsamallur í bili, á veg til Havnar. Onkursvegna fór hann útav vegnum, og visti ikki til sín, fyrr enn hann vaknaði á sjúkrahúsinum. Síðani henda tilburðin, hevur Ingi livað við varandi meininum, hann fekk. Hendingin gjørdi, at hann tók stig til minningardag teirra, ið farast í ferðsluni, og hann ger alt tað praktiska arbeiði í samband við dagin. Hjálp og stuðul fær hann frá Ferðslutrygd.

– Vit geva okkum ikki far um hvussu álvarsom ferðslan í veruleikanum er, sigur Rúna. –Vit eru øll bundin av henni, óansæð um vit hava koyrikort ella ikki, men vit hava so lætt við at gloyma vandan, sum allatíðina lúrir, um vit bert eru óansin eitt lítið bil.

Táið kjakið um hendan minningardagin var frammi fyri fimm árum síðani, vóru tað ikki øll, ið hildu henda minningardagin vera eitt gott hugskot. Fleiri førdu fram, at ein slíkur dagur fór at virka sum salt í sárið hjá teimum avvarandi, ið hava mist ein kæran í ferðsluni. At teimum ikki tørvaði ein dag, har alt landið minti tey á teirra sorg. Men hetta hevur Rúna einki merkt til.

– Eg havi ikki hoyrt um nakran avvarðandi, sum upplivir hendan dagin soleiðis. Tvørturímóti haldi eg, at dagurin er tann besta áminningin, sum hini ungu kunnu fáa. Tað er veruliga neyðugt at minna ungdómin á hvussu álvarsamt og forferdiligt hetta er. At koyra framvið blómunum, kransunum og krossunum, sum liggja framvið vegjaðaran, hevur eina stóra ávirkan á øll. Man fær ein klump í búkin og man sær hvussu skjótt alt kann verða yvirstaðið, greiðir Rúna frá.

– Enn er dagurin ikki vorðin almennur minningardagur, men tað miðja vit ímóti at hann verður. Ferðslan er jú ein ógvuliga týðandi faktorur í gerandisdegnum hjá okkum øllum, og óansæð um vit vilja tað ella ei, so eru vit ein partur av ferðsluni hvørja ferð vit fara út um hurðina. Eg haldi avgjørt, at deyðsvanlukkur í ferðsluni er eitt so mikið álvarsamt evni, sum rørir eitt heilt samfelag á so stóran hátt, at tað átti at fingið ein almennan minningardag, bæði til minnis um tey, ið fóru, men eisini sum áminning til okkum sum liva, sigur Rúna.

### Null-hugsjónin

Hetta er eitt hugtak, sum hevur íblástur úr Svøríki, og sum Jón Kragesteen, dagligur leiðari í Ferðslutrygd og Petur Jacob Sigvardsen, táverandi formaður, arbeiddu við. Teir skrivaðu eitt álit, sum teir lótu løgtinginum. Orðaskiftið í tinginum var sera gott og konstruktivt, og allir tinglimir tóku undir við álitinum.

– Tað var eitt orðaskiftið, sum eg var sera glað um, sigur Rúna. – Tað var veruliga tosað um málið, og allir tinglimir sóu álvarsemið í tí. Ofta verður kjakið í tinginum bert sjóðað niður til at snúgva seg um teknikk og smálutir, men í hesum førinum kom eitt skilagott og álvarsamt kjak burturúr. Tað vóru enntá fleiri løgtingslimir, sum heittu á landstýrismannin um at seta álitið í gildi við lóg, greiðir Rúna frá. Enn er hugsjónin tó ikki samtykt á tingið, men Rúna sigur, at vit hóast tað kunnu vænta okkum onkrar broytingar í næstum.

– Mær vitandi, fer landsstýrismaðurin at seta nakrar broytingar í gildi í heyst. Nøkur uppskot til broytingar eru, sum eru skjót og løtt at fremja, og hesar broytingar koma so í gildi í heyst. Onkur av broytingunum, sum lættliga kundi verið framd, er t.d. uppskotið um royndarkoyrikortið, sigur Rúna.

Null-hugsjónin gongur annars út uppá, at null fólk skulu lata lív í ferðsluni. –Hetta fer allarhelst aldrin at lata seg gera, tí tað eru nakrar vanlukkur, ið ikki kundu verið forðaðar. Men okkara realistiska mál er, at null fólk skulu lata lív av mistøkum hjá bilførarانum. Eingin skal kunna hava skyldina, tá ið deyðsvanlukkur henda. Vit mugu broyta hugburð hvat viðvíkur ferðsluni. Meiri orðaskiftið vit fáa um evnið, størri er møguleikin at hugburðurin broytist, sigur Rúna Sivertsen at enda.

## Deyðsvanlukkur seinastu 10 árini

Yvirlit yvir deyðsvanlukkur í motorakførum seinastu 10 árini, ífylgi skrivinum frá landslæknanum.

| | |
|---|---|
| 1994 | 6 |
| 1995 | 2 |
| 1996 | 4 |
| 1997 | 7 |
| 1998 | 1 |
| 1999 | 7 |
| 2000 | 3 |
| 2001 | 4 |
| 2002 | 2 |
| 2003 | 3 |

Tilsamans 39 fólk hava latið lív á føroysku vegunum, seinastu 10 árini.

**eys**



# Tungt at syrgja í einsemi

**Ein ferðsluvanlukka er ein ógvuslig hending, ið kann hava varandi sálarligar trupulleikar við sær. Men møguleiki er hjá fólki at fáa sálarfrøðiliga kreppuhjálp**

KREPPUHJÁLP
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Hvørja ferð, eitt fólk doyr í ferðsluni, er tað ein ógvuslig og skelkandi hending. Ein slíkur skelkur kann hava varandi sálarligar trupulleikar við sær, ikki bara hjá teimum avvarðandi ella nærmastu, men eisini teimum, ið eru vitni til eina slíka ferðsluvanlukku.

Men tað er hjálp at fáa, tí í oktobur mánaði 2001 skrivaðu Meginfelag Sjúkrakassa

Føroya og felagið Føroyskir Sálarfrøðingar undir sáttmála um ískoyti til sálarfrøðiliga kreppuhjálp.

– Tey eru ikki so fá, sum antin hava verið við í ferðsluvanlukkum, hava mist ein kæran ella ein, ið tey kenna, sum venda sær til okkara, sigur Anna Debes Hentze, sum er ein av teimum, ið kann veita sálarfrøðiliga kreppuhjálp.

Hon sigur, at í Føroyum hevur tað ikki verið siðvenja at leita sær sálarhjálp, tí tað er nakað, vit mugu klára sjálvi. Og tað eru eisini fleiri, ið klára at koma gjøgnum skelkin og missin sjálvi.

– Men tað eru fólk, ið hava fingið so stóran skelk, at tey hava fyri neyðini at fáa serkøna hjálp.

– Summi hava ógvuliga ilt við at lata seg upp fyri øðrum, og tað kann vera sera stríggið at syrgja í einsemi; tá er gott at kunna koma til ein, tú ikki kennir, og sum tú veitst hevur fulla tagnarskyldu, sigur hon.

Á apotekunum kring landið og hjá kommunulæknunum finst ein faldari við upplýsingum um, hvussu tú kanst fáa hesa hjálp. Eisini kanst tú fara inn á heimasíðuna, www.psykolog.fo



*– Tey eru ikki so fá, sum antin hava verið við í ferðsluvanlukkum, hava mist ein kæran ella ein, tey kenna, ið venda sær til okkara, sigur Anna Debes Hentze, sum er ein av teimum, ið kann veita sálarfrøðiliga kreppuhjálp*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fyri 30 árum síðan:

# 13 føroyingar doyðu av ferðsluvanlukku í 1974

**Síðst í 60-unum og fyrst í 70-unum vaks talið av bilum í Føroyum við rúkandi ferð. Hetta hevði nógvar ferðsluvanlukkur við sær. Í 1974 doyðu 18 føroyingar av vanlukkum, harav 13 av ferðsluvanlukkum**

4. januar hendi ein vanlukka í Hósvík, sum kravdi mannalív. Ein 10 ára gamul genta úr Vestmanna, sum var og ferðaðist í Hósvík, spældi við trimum øðrum børnum, tá hon kom fyri ein lastbil. Hon meiddist so illa, at hon doyði.

11. januar hendi ein ferðsluvanlukka á Skála, tá ein 8 ára gamal drongur, sum var á veg tilhandils, bleiv yvirkoyrdur, tá hann fór rennandi yvir um vegin. Hann fekk so mikið stóran skaða, at hann doyði beinanvegin.

22. januar hendi ein vanlukka á Glyvrum. Um hálvgum seks tíðina á kvøldi varð ein 62 ára gamal maður av Nesi yvirkoyrdur aftanífrá av einum persónbili, uttan fyri skúlan á Glyvrum. Maðurin doyði á staðnum, av snuddinum hann fekk.

25. februar hendi ein ferðsluvanlukka í Runavík. Ein 3 ára gamal drongur varð yvirkoyrdur, tá hann kom undan einum garði og inn á høvuðsvegin. Drongurin, sum fekk skaða í høvdið, varð fluttur á Landssjúkrahúsið beinanvegin, men hann var deyður, tá hann kom hagar.

17. mars varð ein 64 ára gomul kona ákoyrd av ein i knallert í Tórsgøtu í Havn. Hon varð uttan vit flutt á Landssjúkrahúsið, har hon stutt eftir doyði.

8. apríl hendi ein ferðsluvanlukka norðan fyri støðina í Mjørkadali, sum kravdi eitt mannalív. Ein vøruvognur, sum kom norðan eftir við tveimum monnum í, fór niðan av vegnum og bóltaði síðan runt. Annar av monnunum, ein var 22 ára gamal havnarmaður, var so illa skaddur, at hann doyði stutt eftir.

16. apríl á morgni hendi ein ferðsluvanlukka í Klaksvík, sum kravdi eitt mannalív. Ein bilur við fýra fólkum fór út av bryggjuni á Stongunum. Tað eydnaðist øllum, uttan einum 17 ára gomlum drongi, at sleppa úr bilinum, áðrenn hann fór til botns.

24. mai hendi ein ferðsluvanlukka í Trongisvági, sum kravdi eitt mannalív. Ein 58 ára gamal maður úr Øravík kom um morgunin koyrandi á motorsúkklu á veg til arbeiðis, tá hann rendi saman við ein persónbil. Stoyturin var so harður, at maðurin doyði á staðnum.

5. juni fór ein syndarligur tilburður fram við Leynavatn, tá ein bilur koyrdi út í vatnið og sakk. Í bilinum vóru eini hjún og 14 ára gamli sonur teirra. Bilurin fór út av marbakkanum og sakk á 10 metra dýpi. Foreldrini bjargaðust, meðan líkið av dronginum varð funnið tveir tímar seinni.

14. juli hendi ein fersluvanlukka á Elduvíkarvegnum, tá ein 28 ára gamal maður úr Elduvík fór út av vegnum í bili sínum og á sjógv. Hann var druknaður, tá froskmenn tóku hann upp aftur.

Í desember 1974 hendi ein syndarlig ferðsluvanlukka í Havn sum kravdi trý mannalív. Um hálvgum sekstiðina um kvøldið fór ein persónbilur út av bryggjuni í Vágsbotni og á sjógv. Í bilinum vóru fimm fólk. Eini foreldur við trimum synum. 9 ára gamli sonurin og pápin bjargaðust, meðan mamman og tveir synir, annar 7 og hin 5 ára gamlir, doyðu.

*Kelda: Myndaárbókin, árið ið fór 1974*

VARPIÐ
Skráir og ummælir
16 síður
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá
TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network
Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

TILBOÐ
Galdandi til 10. juli
- ella so leingi vøra er á goymslu



GOSBAÐ
• Við 10 jetdysum og frontpanel. Uttan armatur
• Veitingartíð 4-6 vikur
vanligur prísur 11.498,-
BERT 8.598,-
spar 2.900,-



DAMP MASSAGUKABINA
• Við fótmassagu, digitalari dampstýring, radio og ljósterapi.
• Mál: 83 x 118 cm
vanligur prísur 27.298,-
BERT 19.998,-
spar 7.300,-



HVÍTT BAÐIRÚMSMØBIL
• Við handtøkum, vaski, spegli og ljósi, men uttan blandingsbattarí.
• Verður latið samlað
vanligur prísur 7.098,-
BERT 3.898,-
spar 3.200,-

damor
KVÍGGJARTÚN 3 • ARGIR • TEL 315415 • FAX 319001